SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Skattalættin er ætlaður familjunum og er ein íløga í framtíð Bretlands*

*(Gordon Brown)*

# Aftur mattrot í Norðurkorea



*Jørðin gav lítið av sær í fjør, so myndugleikarnir hava skamtað matin.*

**Suðurkoreanskir hjálparfelagsskapir ávara um, at maturin er farin at ganga undan í granna-landinum**

Teir suðurkoreonsku hjálparfelagsskapirnir siga, at støðan í Norðurkorea er ikki so ring sum í nítiárunum, tá nógvir norðurkoreanar doyðu í hungri. Men felagsskapirnir siga, at støðan er kortini álvarssom, og at nógv fólk í Norðurkorea hava ov lítið til matna, og uppaftur fleiri fáa ikki tann rætta matin.

- Vit vænta ikki beinleiðis hungursneyð enn, men tað støðuga matvørutrotið ger, at mong fáa ov lítið og uppaftur fleiri fáa skeivan mat, sigur Noh Ok-jae, sum er talsmaður hjá einum av teimum suðurkoreonsku hjálparfelagsskapunum.

Hann leggur afturat, at heystið sveik í Norðurkorea í fjør, so jørðin gav alt ov lítið av sær. Tað noyddi myndugleikarnar at skamta mat í býunum við tí úrsliti, at summi fáa ov lítið.

Sambært Noh Ok-jae vóna nógvir norðurkoreanar at fáa mat úr øðrum londum, so skjótt samráðingarnar um tey norðurkoreonsku kjarnorkuvápnini eru komnar á mál.

Men í løtuni røkist einki fyri, at tær enda, skrivar NTB.

# Hevði óvæntað uppskot í skjáttuni



*Gordon Brown við teirri kendu, reyðu skjáttuni í Downing Street í London. Hesaferð vakti tað ans, tá hann lat skjáttuna upp*

**Tað kom óvart á bretar, tá Gordon Brown kom við uppskoti um skattalætta**

Í Bretlandi eins og aðrastaðni í Evropa plaga tað at vera flokkarnir høgrumegin miðjuna, sum leggja fram uppskot um at geva einstaklingum og vinnulívi skattalætta, og tí kom tað óvart á bretar, tá Gordon Brown, fíggjarmálaráðharri, í gjár legði fram uppskot um skattalætta.

Skattalættin er partur av fíggjarlógaruppskotinum, og hetta er helst tað seinasta fíggjarlógaruppskotið, sum Gordon Brown leggur fram. Gongst sum ætlað verður hann forsætisráðharri, tá næsta fíggjarlógaruppskotið sær dagsins ljós.

Fráfarandi fíggjarmálaráðharrin sigur, at tann ætlaði skattalættin skal serliga koma barnafamiljum og teimum lágløntu til góðar.

- Hetta er eitt fíggjarlógaruppskot, sum leggur lunnar undir bretsku búskini, og sum tryggjar rættvísi og framtíðina, segði Brown í parlamentinum í gjár. Hann vísti á, at uppskotið fer at gera bretsku skattaskipanina meiri rættvísa, enn hon er.

Mánadagin boðaði tann konservativi andstøðuflokkurin frá, at hann er til reiðar at lækka skattin hjá vinnulívinum trý prosent. Eingin hevði væntað, at Gordon Brown fór at koma við sama uppskoti tveir dagar seinni.

## STUTT SAGT

### Dómari koyrdur frá

Tað er ikki á hvørjum degi, at dómarar verða koyrdir til hús, men tað hendi í Týsklandi fyri nøkrum døgum síðani. Har kom løgmálaráðið til ta niðurstøðu, at ein dómari í Frankfurt hevði ikki borið seg rætt ar. Dómarin skuldi døma í einum máli, har ein muslimsk kvinna kravdi at sleppa burtur úr hjúnalagnum við mannin, sum eisini er muslimur. Kvinnan vísti á, at maðurin var harðligur og hevði hótt hana við lívinum, men tað helt dómarin ikki vera nóg góða grundgeving fyri skilnaði. Hann vísti á, at sambært Koranini hevur maðurin rætt til at harta konu sína, og tí helt hann ikki, at maðurin í hesum málinum hevði gjørt nakað skeivt. Men løgmálaráðið heldur, at dómarin bar seg skeivt at, og tí er hann nú koyrdur til hús, skrivar DPA.

### Zimbabwe er sum Titanic

Forsetin í Zambia, Levy Mwanawasa, heitti í gjár á leiðararnar í hinum londunum í syðru helvt av Afrika og bað teir broyta politikkin mótvegis Zimbabwe. Zambiski forsetin segði, at búskapurin í Zimbabwe liggur í skeljasori, og at landið tí kann berast saman við eitt søkkandi "Titanic". Levy Mwanawasa segði, at tær diplomatisku royndirnar at fáa zimbabwiska forsetan, Robert Mugabe, at leggja á annan bógv hava munað lítið, og hann helt tí, at stundin er komin til at broyta politikkin mótvegis Zimbabwe og Mugabe.

### Ráðgevar stevndir

Hóast George W. Bush, forseti, av øllum alvi royndi at forða tí, hevur ein nevnd hjá Umboðsmannatinginum kravt, at ein av fremstu ráðgevum forsetans, Karl Rove, skal svara spurningum í sambandi við, at fleiri almennir ákærar eru koyrsir úr starvi í seinastuni. Demokratarnir í Umboðsmannatinginum vilja vera við, at tað vóru politiskar grundgevingar, sum lógu aftanfyri, tá Alberto Gonzales, løgmálaráðharri, gjørdi av at koyra teir átta ákærararnar til hús. Demokratarnir vísa á, at undan uppsagnunum var nógv samskifti millum løgmálaráðið og Hvítu Húsini um málið. Nú skulu Karl Rove og aðrir ráðgevar hjá Bush greiða frá, hvønn lut Hvítu Húsini áttu í uppsagnunum.